Tórshavnar havn
Eystara bryggja
Postrúm 103
110 Tórshavn

Tórshavn, hin 18. desember 2007
Málnr.: 6110-200600982-20
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: SP / Tlf.: 35 64 24

**Umhvørvisdeildin**

# Loyvi at økja nøgdina av tilfari, ið verður aftursøkt

## 1. Loyvi og heimild

Sambært grein 2 í kunngerð nr. 38 frá 8. mars 2001 *um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum* við seinni broytingum, veitir Umhvørvisstovan við hesum loyvi til at víðka upprunaliga loyvið til aftursøkking, dagfest 14. desember 2006, upp til 120.000 $m^3$. Loyvið verður givið í sambandi við dýping og gerð av bryggju á Oyrareingjum.

Tilfarið kann aftursøkkjast millum Stong og Eystnes, á umleið 62° 02,7' N og 06° 41,3' W, og eru treytirnar í upprunaliga loyvinum galdandi, málnr. 200600982-5.

## 2. Umsókn og málsviðgerð

Hin 25. september 2007 fekk Umhvørvisstovan umsókn frá Tórshavnar havn um loyvi at økja nøgdina av tilfari, sum skal aftursøkkjast, úr 75.000 $m^3$, sum upprunaliga loyvið ásetti, til 120.000 $m^3$. Samlaða nøgdin, sum verður tikin upp er mett at vera uml. 150.000 $m^3$, og varð upprunaliga roknað við, at uml. helvtin av tilfarinum kundi brúkast til uppfylling. Av tí, at tað síðani hevur víst seg, at tilfarið ikki er egnað til uppfylling, verður nú søkt um loyvi til at aftursøkkja meginpartin av tilfarinum, t.e. 120.000 $m^3$. Søkt verður um loyvi at søkkja tilfarið millum Stong og Eystnes eins og í upprunaliga loyvinum.

Av tí, at talan er um so stóra øking av nøgdini, hevur Umhvørvisstovan mett, at talan eigur at vera um nýtt loyvi, og at málsviðgerðin eigur at fara fram sambært ásetingunum í kunngerðini um aftursøkking, t.e. umsóknin skal til hoyring og at ásetingin um kærufreist uppá fýra vikur eigur at vera galdandi.

## 3. Ummæli

Sambært grein 5 í áðurnevndu kunngerð um aftursøkking, skulu umsóknir sendast til Fiskimálaráðið, Landsverk og avvarðandi kommunu til ummælis.

Umsóknin varð send til ummælis hjá Fiskimálaráðnum, Fiskirannsóknarstovuni, Landsverki, Tórshavnar kommunu og Nes kommunu.

Eingin teirra hevði nakrar viðmerkingar til umsóknina.

Hin 23. oktober 20007 hevur Umhvørvisstovan, frá Alfredi Olsen, løgtingsmanni á Toftum, fingið mótmæli ímóti, at loyvi verður givið til at økja nøgdina, sum verður aftursøkt. Mótmælið er grundgivið við, at aftursøkkingin fer at drepa fisk og djóra- og plantulívið, og fer at vera til skaða fyri fiskatilfeingið o.a. á økinum eystanfyri.

Umhvørvisstovan hevur sent mótmælið til ummælis hjá Fiskirannsóknarstovuni og Havlívfrøðiligu royndarstøðini, sum eru sakkunnleikar á hesum øki.

Hvørki Fiskirannsóknarstovan ella Havlívfrøðiliga royndarstøðin meta, at stórvegis vandi er fyri, at søkkingin fer at hava nakran týdning fyri fisk á økinum, og at ein møgulig ávirkan á botndjór o.a. verður avmarkað og í eitt avmarkað tíðarskeið av tí, at streymhart er á økinum, og at tilfarið, sum fellir á botn, tí skjótt verður ført burtur við streyminum.

Tilfarið er áður kannað, og varð staðfest, at innihaldið av dálkandi evnum er so lágt, at tilfarið kann søkkjast uttan vanda fyri dálking.

## 4. Avgerð

Við støði í egnum metingum og áðurnevndu ummælunum í málinum, metir Umhvørvis-stovan, at tilfarið kann verða aftursøkt millum Stong og Eystnes uttan vanda fyri dálking ella týðandi skaðiligt árin á fiska- og djóralív á økinum

Umhvørvisstovan hevur tí tikið avgerð um at loyva, at nøgdin sum verður aftursøkt, kann økjast úr 75.000 $m^3$ upp til 120.000 $m^3$.

Aftursøkkingin kann fara fram millum Stong og Eystnes, uml. á knattstøðu 62° 02,7’ N og 06° 41,3’W, eins og í upprunaliga loyvinum.

Avgerðin hevur verið til ummælis hjá Tórshavnar havn, Landsverki, Fiskimálaráðnum, Tórshavnar kommunu, Nes kommunu og Havlívfrøðiligu royndarstovuni.

Umhvørvisstovan hevur fingið svar frá Tórshavnar havn, Havlívfrøðiligu royndarstovuni og Nes kommunu.

Tórshavnar havn hevur ongar viðmerkingar.

Havlívfrøðiliga royndarstovan hevur viðmerkingar um nakrar av treytunum, sum vórðu mettar at vera ógreiðar.

Nes kommuna metir ikki, at tað er rætt at søkkja so stórar nøgdir av slíkum tilfari millum Stong og Eystnes, bæði av umhvørvisligum og lívfrøðiligum orsøkum, uttan tó at nevna á hvønn hátt tilfarið kann ávirka umhvørvið, lívið í sjónum ella á botni.

Bæði Fiskirannsóknarstovan og Havlívfrøðiliga royndarstøðin hava mett, at aftursøkkingin kann fara fram uttan stórvegis vanda fyri lívinum í sjónum og á botni. Eisini er staðfest, at tilfarið ikki inniheldur dálkandi evni, og kann tilfarið tí søkkjast uttan vanda fyri dálking.

## 5. Treytir

Loyvið til aftursøkking er treytað av hesum ásetingum:

5.1 Loyvið fær ikki gildi fyrr enn kærufreistin uppá fýra vikur sambært 8. petti er úti.

5.2 Mest møguligt av tilfarinum skal nýtast til uppfylling ella annað, so at minst møguligt verður aftursøkt.

5.3 Loyvið umfatar bara tilfar, sum er tikið upp av botni á økinum, sum er tilskilað í umsóknini.

5.4 Fyri at meta um møgulig árin, skal Tórshavnar havn standa fyri sýnistøku og kanningum av botninum á aftursøkkingarstaðnum eins og í hóskandi frástøðu. Fyrstu sýnini skulu takast skjótast gjørligt, í seinasta lagi fýra vikur aftaná at loyvið er givið. Síðani skjótast gjørligt eftir, at aftursøkkingin er liðug, í seinasta lagi fýra vikur. Eisini skulu sýni takast uml. seks mánaðir eftir, at aftursøkkingin er liðug.
Sýnini skulu kannast fyri slag av tilfari, t.e. viðv. kornstødd, og sammetast skal við aftursøkta tilfarið. Eisini skal metast um djóralívið á staðnum, við tí endamáli at staðfesta møgulig árin á botnviðurskiftini á og nærhendis aftursøkkingarstaðnum.
Sýnistøka og kanningar skulu gerast av kanningarstovu ella felag, sum Umhvørvisstovan kann góðtaka.
Gerast skal sýnistøku- og kanningarskrá, sum skal góðkennast av Umhvørvisstovuni.
Allar sýnistøkur og kanningar skulu gjaldast av Tórshavnar havn.

5.5 Nøgdin, sum verður aftursøkt skal skrásetast saman við tíð, knattstøðu, dýpi og hvaðani tilfarið er tikið. Tá arbeiðið er liðugt, skal frágreiðing sendast Umhvørvisstovuni um hvussu nógv er aftursøkt, nær arbeiðið varð gjørt o.s.fr.

## 6. Eftirlit

Umhvørvisstovan hevur eftirlit við, at treytirnar í hesum loyvi verða hildnar. Tórshavnar havn skal lata allar upplýsingar, sum eru neyðugar, og skapa umstøður fyri, at Umhvørvisstovan kann útinna eftirlitið.

## 7. Gjald

Tórshavnar havn skal, sambært kunngerð nr. 31 frá 8. mars 2001 *um gjøld eftir havumhvørvislógini*, rinda fyri ta viðgerð, Umhvørvisstovan hevur havt í sambandi við hetta loyvi. Somuleiðis skal gjaldast fyri møguligt eftirlit.

Gjaldið verður roknað við grundarlagi í tíðarnýtsluni og øðrum kostnaði í sambandi við viðgerðina.

## 8. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært grein 10 í kunngerð nr. 38 frá 8. mars 2001, *um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum*, kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum sendir hana til landsstýrismannin saman við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, loyvið er almannakunngjørt. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Loyvið fær ikki gildi fyrr enn kærufreistin er úti.

Jóhanna Olsen, settur deildarleiðari

/

Suni Petersen, málsviðgeri

Avrit: Landsverk, Postrúm 78, 110 Tórshavn
Fiskimálaráðið, Postrúm 347, 110 Tórshavn
Fiskirannsóknarstovan, Postrúm 3051, 110 Tórshavn
Tórshavnar kommuna, Postrúm 32, 110 Tórshavn
Nes kommuna, Postrúm 43, 650 Toftir
Landslæknin, Postrúm 9, 110 Tórshavn
Havlívfrøðiliga royndarstøðin, Mjólkargøta, 180 Kaldbak